Samskiparin í Fiskivinnugransking
RC Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn

At handa: Ásmundi Guðjónsson

# Reingerð av fiski

# Menningarverkætlan

## 1. frágreiðing

Prototypa nr. 1

Prototypa nr. 2

Pomek spf
Flesjavegur 1
FO-700 Klaksvík

Klaksvík tann 6. apríl 2004

# Innihald

Samandráttur ... 3
Prototypa nr. 1, roynd og eftirmeting ... 4
Prototypa nr. 2 ... 5
Prototypa nr. 1, myndafrágreiðing ... 6
Prototypa nr. 2, myndafrágreiðing ... 8
Niðurstøða ... 13

# Samandráttur

At hava reina ráðvøru inn í eina tilgongd, betrar um møguleikarnir fyri at fáa eina reina vøru út úr tilgongdini. Hesum kunnu flest øll taka undir við. Menningarverkætlanin "Reingerð av fiski" er ein liður í at flyta mørkini, fyri hvat vit kalla reinan fisk. Ein av grundgevingunum fyri at fara undir verkætlanina var, at tað er skilagott at miða ímóti at allur fiskur, sum kemur upp á land, er javnt reinur. Møguliga eisini koma til eitt mát fyri hvussu reinur fiskurin er.

Menningararbeiðið við at framleiða eitt tól, sum kann reingera fiskin umborð, hevur gingið eftir ætlan. Prototypa nr. 1 vísti á styrkir og veikleikar, sum vóru viðgjørdir og eftirmettir. Prototypa nr. 2 bleiv framleidd við støði í eftirmetingunum og vísti seg at virka væl, og verða álítandi í brúki.

Støða var tikin til, at prototypa nr. 2 var egnað, at verða roynd í veruligum arbeiðsumstøðum. Hon bleiv sett um borð á M/S OSLA. Manningin var hugað at verða partur av menningarverkætlanini, og vísti seg eisini at hava stóran týdning fyri tilgongdina.

Royndir verða gjørdar við prototypu nr. 2, sum er í brúki um borð á M/S OSLA, har prototypan er partur av dagligu arbeiðsgongdini. Úrslitini og eftirmetingarnar frá hesum royndum, verða grundarlag undir arbeiðinum, við at fyrireika og framleiða prototypu nr. 3.

# Prototypa nr. 1, roynd og eftirmeting

Eftir at úrslitini frá undanverkætlanini vóru samlað saman og viðgjørd, bleiv tíð sett av til eina breiða eftirmeting og greining av tí samlaðu verkætlanini. Hetta varð neyðugt fyri at tryggja at allir partar í verkætlanini kundu koma við símum viðmerkingum og konstruktivum kritikki. Serliga bleiv dentur lagdur á at hava eitt tætt samband við vinnuna, og seta spurningar, soleiðis at møguligir veikleikar kundu viðgerast. Havt varð í huga, at mangan kann verða trupult at seta orð á mannagongdir, sum ein hevur arbeitt við í langa tíð, og sum hava verið ein náturligur partur av arbeiðinum umborð. Við tolsemi og neyvum samskifti partanna millum, bleiv eitt uppskot gjørt til prototypu nr. 1.

Henda prototypa varð roynd, sum teldugjørd simulering og animatión. Eftir nakrar tillagingar vísti tað seg, at prototypan hevði framtíðarmøguleikar, og verd at royna í verki.

Fyri at prototypan skuldi geva eina mynd av viðurskiftunum, sum eru galdandi í veruleikanum, varð avgjørt at framleiða prototypu nr. 1 til ein ávísan bát. Við hesum varð gjørligt frá byrjan, at hava samskifti við fólkini um borð, um hvussu skilabest varð at framleiða prototypuna. Viljin til at hava við nakað nýtt at gerða, sum kann verða trupult, at fáa at virka, varð til staðar hjá manningini.

Tað kann verða ein ring støða hjá bátinum, um eitt nýtt tól vísir seg at virka so illa, at tað tarnar fiskaríðnum. Við hesum í huga, bleiv fyrsta roynd við prototypu nr. 1 gjørd á landi við ísaðum fiski. Royndin varð tikin upp á video og brend á DVD. Royndin vísti, at neyðugt varð at gera nakrar tillagingar. Hendan roynd bleiv gjørd við handamegi.

# Prototypa nr. 2

Eftir at hava mett um royndina við prototypu nr. 1 á landi, og gjørt neyðugu tillagingarnarn, bleiv prototypa nr. 2 framleidd. Við tí vitan, sum varð fingin til vega við prototypu nr. 1 varð avgjørt at royna prototypu nr. 2 umborð á bátinum.

Tær fyrstu royndirnar vístu, at upprunaligu metingarnar frá undanfarnu eftirmetingunum, vóru eftirfarandi. Tær tøkniligu loysnirnar, sum vóru valdar til prototypu nr. 1 og tillagaðar í prototypu nr. 2, vístu seg at vera skilagóðar at arbeiða víðari við.

Tað vísti seg, at prototypa nr. 2 varð nóg álítandi til, at manningin vildi leingja royndartíðina. Longda royndartíðin hevur til endamáls, at lýsa viðurskiftini viðvíkjandi val av tilfari. Um ein skal kunna siga nakað neyvari um, hvussu tilfarið, sum er valt til prototypu nr. 2 roynist, er neyðugt at prototypan verður brúkt í røttum høpi. Eisini er umráðandi at fáa lýst, hvussu prototypan verður viðfarin, tá báturin liggur við bryggju ella er á veg á og av fiskileið.

Royndin við prototypu nr. 2 umborð, hevur eisini givið innlit í, hvussu manningin handfer fiskin til vasking og frá vasking. Tá ið fiskurin verður bløðgaður og handfarin til vasking, er umráðandi at arbeiðið kann gerast skjótt, og uttan ov høg krøv um neyvleika.

# Prototypa nr. 1, myndafrágreiðing




Karið til prototypuna bleiv framleitt soleiðis, at tað kundi setast á plássið, har kassarnir standa, sum hvítur ringur er settur um á myndini niðanfyri.






Dúkurin, sum liggur í karinum kann rullast upp á trumluna í øðrum endanum, og er settur fastur í hinum endanum soleiðis, at hann einkult og skjótt kann loysast







Á prototypuni bleiv trumlan drivin við einum hondkasti. Ymiskar loysnir vóru uppi at venda viðvíkjandi hvussu dúkurin skuldi søkka, og leggja seg eftir innvegginum á karinum.
Eitt hóskandi lutfall millum hol í dúkinum og innsvejsaðar metal stengur í dúkin, varð funnið, soleiðis at dúkurin sakk skjott, og eisini varð nóg sterkur.




Fyri at fáa ein góðan vísning hjá dúkinum, bleiv trumlan skipað soleiðis, at hon kundi flyta seg ímóti fasta endanum. Umráðandi var, at holini vóru snøgg, so at dúkurin kundi haldast reinur.






Kantar vóru settir fram við kantinum á karinum, og farið varð á fiskamarknaðin, fyri at gera tær fyrstu royndirnar. Fiskurin, sum varð brúktur til royndirnar, var ísaður fiskur. Sagt varð framman undan frá fólkinum á fiskamarknaðinum, at ein skuldi taka hædd fyri hesum, tá hugt varð eftir hvussu fiskurin skikkaði sær.




Deyðstívur fiskur hevur ikki somu eginleikar at glíða, sum nýblóðgaður fiskur, og hetta vísti seg eisini at hava ávirkan á royndirnar. Sjálvt um fiskurin var stívur, sást at ein skuldi umhugsa loysnina eina ferð enn, við at trumlan var á stuttu síðuni á karinum.

# Prototypa nr. 2, myndafrágreiðing




Royndirnar við prototypu 2 eru gjørdar umborð á "M/S OSLA" v/Fjallið spf, Norðdepil.




Útgangsstøði er dekkið, sum tað sá út. Úti til høgru á myndini sæst dragirullan, sum er løgd inn. Fram við lúnningini sæst ein renna, har fiskurin liggur áðrenn hann verður blóðgaður.




Plássið, sum skal brúkast til vaskikarið sæst í miðjuni á myndini.
Tað hevur týdning fyri arbeiðsumstøðurnar hjá manninum, sum blóðgar, at hann kann standa væl ímillum rennuna, har hann tekur fiskin frá, og vaskikarið, har hann leggur fiskin frá sær. Gott er um plássið er so lítið, at hann kann standa tryggur, uttan at halda sær.




Á prototypu nr. 2 er trumlan til dúkin sett á longu síðuna á karinum. Hetta varð gjørt fyri at sleppa undan, at trumlan skal flyta seg. Tá dúkurin gerst strammur, og frástøðan til fasta endan lutfalsliga lítil, er vísningurin á dúkinum góður, soleiðis at fiskurin glíður úr karinum.




Arbeitt var víðari við, at finna tað røttu frástøðuna ímillum holini í dúkinum. Tá trumlan er sett á longu síðuna er dúkurin eisini breiðari, og tá kunnu gerast fleiri hol í dúkin, uttan at ein kemur ov nær styrkimarkinum fyri dúkin.




Fyri at trumlan skal arbeiða lagaliga eftir umstøðunum umborð, vóru royndir gjørdar við mekaniskum tøkniligum loysnum. Krøvini til loysnina vóru ein hóskilig javnvág ímillum pláss, ferð og styrki.




Frástøðan millum trumluna og ovara kant á karinum er tengd at, hvussu nógv løg av dúki skulu upp á trumluna. Harafturat er umráðandi fyri arbeiðsumstøðurnar, at trumlan ikki kemur ov høgt upp.



Frárenslið á karinum verður sett á tann endan, sum skal venda aftureftir umborð, fyri at kunna tøma karið heilt.
Vatnstøðan í karinum kann stillast við einum teleskoprøri á endanum.
Dysur til at stýra turbulentu streymunum í karinum, sum skulu flyta fiskin runt og vaska hann, eru ikki skipaðar enn.




Mátini á trumluni eru vald út frá einum lutfalli ímillum frástøðuna ímillum innsvejsaðu metalstengurnar í dúkinum, tvørmáti á trumluni og hvussu nógv løg skulu upp á trumluna.




Trykkið á hydraulisku pumpuni og rúmdin sum rennur ígjøgnum motorin fyri hvørt sekund, bleiv hildið upp ímóti, vektini á fiskinum í karinum, sum var oman fyri vatnskorpuna, og ynsktu ferðina.




Fyri at kunna arbeiða skjótt niður aftur, tá ið karið er tómt, er økið, sum fer til at svejsa metal inn í dúkin, minkað. Soleiðis gerst pláss fyri eini røð av holum afturat.




Fyri at prototypan kundi setast umborð, vóru allar samankomingar, í hydraulisku skipaninni gjørdar eftir forskriftunum um tryggleika.




Prototypan er komin umborð, og tað verður gjørt klárt at seta hana fasta.




Fjarstøðan frá vaskikarinum, til rennuna úti í stýriborð er eftir ynski frá manningini. Og karið verður sett fast.




Fyrstu royndirnar umborð við prototypu nr. 2 vóru gjørdar. Myndin vísir umstøðurnar, tá fiskurin glíður úr karinum.




Ynskiligt er, at fiskurin kann renna frá vaskikarinum til tann kassan, sum er tilætlaður. Sum skilst virkar hetta best, tá eitt sindur er at í sjónum. Ein skal hava í huga, at hæddarmunurin, ímillum vaskikarið og kassarnar, ikki kann gerast ov stórur. Møguliga skal ein tøknilig loysn finnast á hesum. Hetta vil vísa seg, tá royndirnar við prototypu nr. 2 eru komnar longur.

# Niðurstøða

Arbeiðið við prototypu nr. 2 hevur víst, at tað er møguligt at nýta einfaldar tøkniligar loysnir, sum eru álítandi og brúkaravinarligar.

Fyrireikingarnar, sum vóru gjørdar undan framleiðsluni av prototypu nr. 2, høvdu við sær, at partarnir sum eru tengdir at menningarverkætlanini, komu eitt stórt stig nærri eini brúkiligari loysn. Royndirnar frá prototypu nr. 1 vístu seg at verða virðismiklar, sum støði undir kjakinum og metingunum. Eisini vístu royndirnar, frá undanverkætlanini, seg at geva íkast og íblástur. Serliga tey vigaðu lutføllini ímillum krøv og eginleikar vóru áhugaverd.

Tilgongdin við at framleiða prototypu nr. 2 vísti eisini á ymiskar veikleikar, sum neyðugt var at hyggja nærri at. Her verður serliga hugsað um samskifti ímillum partarnar, sum eru partar av fyrireikingunum undan eini prototypu, og eftirmetingum frá tilhoyrandi royndum. Hetta samskifti hevur stóran týdning fyri góðskuna av teimum loysnum, sum verða valdar.

Úrslitini frá protutypu nr. 2 vísa seg at verða góð. Prototypan virkar, sum ein partur av arbeiðsgongdini umborð, og vísir seg eisini at reingerða fiskin, sum tilætlað. Fyri at lýsa viðurskiftini nærri, viðvíkjandi sliti og styrki á tøkniligu loysnunum, verður mett, at tað er skilagott at taka hædd fyri eini prototypu nr. 3 í verkætlanini. Peningaliga verður mett, at hetta er møguligt innan fyri verandi fíggjarkarmar.